

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 09 - 2013

# Russar skuldseta Greenpeace-fólk fyri at vera sjórænarar

Russiskir myndugleikar ætla ikki at lata sær linda, at fólk frá umhvørvisfelagsskapum gera seg inn á oljupallar í russiskum sjógvi. Fólk hjá Greenpeace felagsskapinum, sum royndu at koma sær umborð á ein boripall í Barentshavinum í farnu viku, verða nú eftir øllum at døma skuldsett fyri sjórán ella piratvirksemi. Tað var í farnuviku, at fólk frá Greenpeace royndu at koma umborð á russiskan boripall, sum ger klárt til at fara undir oljuframleiðslu í Barentshavinum. Skipið Arctic Sunrice og øll manningin uppá 30 er nú flutt til ein fjør nærhendis Murnmansk. Tey koma fyri rættin í næstum og kunnu fáa upp til 15 ára fongsul og stóra bót fyri at hava roynt at koma sær upp á ein boripall uttan loyvi. Umboð fyri Greenpeace sigur kortini, at einki av teirra fólkum enn er skuldsett. Russiskir hermenn lupu á Greenpeace skipið hósdagin, eftir at tvey av tess fólkum, ein finni og ein sveisari vórðu handtikin eftir at hava roynt at koma sær upp boripallin Prirazlomnaya, sum Gazprome eigur. Russar siga, at teir noyddust at hertaka skipið, tí tað gjørdi seg inn á ein russiskan boripall og høvdu teir onga trygd fyri, at hetta ikki kundi útvikla seg til nakað meira álvarsligt. Greenpeace sigur harafturímóti, at teirra atsókn var friðalig, og at felagsskapurin í meira enn 40 ár hevur staðið fyri líknandi hendingum við tí fyri eygað at verja umhvørvið, og hendingin í Barentshavinum var einki øðrvísi enn allar aðrar.